Skúlastýrisfundur 10.05.2022

Møtt vóru

Durita Poulsen, Rakul Borg Brattaberg, Birgir Jørgensen, Jónleyg Eyðunsson, Hjørdis Simonsen og John Henrik Holm

Skrá.

1. Játtanin komandi skúlaár
2. Skúlalaðið
3. Støðumet
4. Orðblindanæmingar
5. Verkætlan umsókn til UVS
6. Ymiskt

Ad. 1

**Tímajáttanin skúlaárið 2022/23**
Við hesum verður sagt frá, at grundað á upplýsta næmingatalið 1. februar í 2022 hevur skúlin fingið tillutaða fyribils heildarjáttan, sum er skipað soleiðis:

- **36.644 klokkutímar fyri skúlaárið 2022/23**, sum skúlin skal halda seg innanfyri
- **404 pultstímar** eru játtaðir
- Til skúlaárið 2022/23 eru **føstu størvini 0**
- Játtaðir eru 1.320 námsfrøðiligir stuðulstímar – viðv. føstum størvum verður neyðugt at hyggja at tí serstakt fyri hvønn skúla sær
- **0 tímar** eru játtanir um vikuna til undirvísing í føroyskum

Játtanin er lækka.í min til inniverandi skúlaár við 1.244 tímum um árið. Játtanin til Lonina er óbroytt og samstarv okkara við Porkeris skúla heldur á fram komandi skúlaár.

Setanarbólkurin er hesin: John Henrik Holm, Hjørdis Simonsen, Levi Mørk og Durita Poulsen

Skúlin søkir eftir lærarum og stuðlum í vikuni.

Ad. 2

Birgir hevur tosað við teknisku deild hjá kommununi um at fáa skúlalaðið dagført. Tekniska deild hevur nógv at gera og spælir tí bóltin aftur til skúlastýrið at byrja arbeiði at dagføra skúlalaðið. Samtykt var at søkja Mentunarnevndina um stuðul at byrja hetta arbeiði. Vit fara at søkja um stuðul á kr. 10.000,- til at fáa tekningar gjørdar og innheinta tilboð til ætlaðu dagføringarnar.

Ad. 3

Skúlastýrið hevur fingið niðanfyri standandi áheitan frá lærarum í miðdeild skúlans.

---

*Umbøn frá lærarum í miðdeildini í Vágs skúla.*

*Vit hava leingi tosað um, hvussu keðiligt vit halda tað vera, at næmingar í 5. og 6.flokki fáa próvtøl.*

*Vit meta hetta vera óneyðugt, tí tey ikki duga at fyrihalda seg til, hvat tølini merkja. Eisini meta vit, at hetta ikki hevur góða ávirkan á hvørki børnini, foreldur ella lærarar.*
*Vit ynskja heldur, at man brúkar foreldraviðtalurnar til at vísa á, hvussu næmingurin klárar seg í skúlanum.*

*Vónandi taka tit hetta upp í skúlastýrinum. Vit koma fegin inn at tosa við tykkum, um hetta er neyðugt, ella um tit vilja vita meira um, hví vit halda hetta. Eisini eru tit vælkomin at spyrja, hvussu vit so ætla at geva næmingum og foreldrum eftirmeting av børnunum.*
*Kh*

*Rebekka, Jóna, Connie, Rannvá, Dagfinn, Finn, Anita og Gunnleif*

---

Skúlastýrið tekur undir við hugskotinum, men vil so hava næmingaviðtalurnar mentar og meira umfatandi, møguliga skulu vit hava næmingarnar við til viðtalurnar. Ynskiligt hevði verið um skúlin skipar fyri einum skeiði í at hava viðtalur. Skúlastýrið hugsar at hesar viðtalur eiga at verða longri enn vanligt er og kanska skulu tvær viðtalur verða um ári.. Johanna Andreasen verður nevnd sum ein møguligur skeiðshaldari

Ad. 3

Skúlastýrið ynskir eina kunning um hvussu skúlin handfer næmingar við avbjóðingum í lesing.

Skúlin kannar allar næmingar í 3. flokki fyri orðblindni/lesiavbjóðingar. Allir lesiveikir næmingar hava teldu við CD orð. Hesir næmingar fáa serstaka undirvísing í brúk av CD-orð. Umframt hetta so hava allir lærarar skúlans verði á skeiðið í brúk av CD-orð innan fyri seinasta mánaðin.

Allar fyrisagnir vm. verða skrivaðar á teldur og har brúka lesiveiku næmingar okkara CD-orð.
Sølvi Andreasen, orðblindalærari skúlans er farni frá við eftirløn og skúlin hevur heit á ein lærara at nema sær útbúgving sum orðblindalærari. Hendan útbúgvingin byrjar í sept. 2022

Ad. 5

Skúlin hevur søkt UVS um fylgjandi verkætlan komandi skúlaár:

**Heiti: Ver Virkin – trívnaður í Vágs Skúla**

**Endamál: Endamálið í verkætlanini er at allir næmingar í Vágs Skúla skulu verða virknir. Vit taka støði í ABC fyri Sálarheilsu hjá Fólkaheilsuráðnum og nýta granskingargrundaðu rørslukonseptini FIT FIRST (10, 20 of TEEN).**

ABC fyri sálarliga heilsu er ein verkætlan hjá Fólkaheilsuráðnum, sum er í áhaldandi menning. Endamálið við ABC fyri sálarliga heilsu er at fremja sálarliga heilsu og trivnað millum íbúgvarnar í Føroyum. **Sálarlig heilsa snýr seg um alt tað, ið ger lívið vert at liva**. Tað hevur eins stóran týdning at ansa eftir og varðveita góða sálarliga heilsu, eins og tað hevur týdning at ansa eftir kropsligu heilsuni

Í stuttum vilja vit verða VIRKIN. Hvar merkir tað ??

- Tú kanst vera kropsliga virkin á nógvar ymiskar háttir og á nógvum ymiskum støði. Tú kanst fara ein gongutúr, rennitúr, svimjitúr, spæla hondbólt ella badminton, dansa til títt yndislag ella gera reint.
- Tú kanst vera sosialt virkin tá tú ert saman við familju, vinum, starvs- ella floksfeløgum, tosar við grannan ella fólk tú kennir til handils, tú kanst vera partur av onkrum frítíðarfelagsskapi sum t.d. kóri, veving, leir ella taka lut í øðrum sosialum virksemi.
- Tú kanst vera sálarliga virkin tá tú lesur eina bók, loysir krossorðagátu, spælir borðspæl, fert í biograf ella vitjar eitt listasavn. Tað snýr seg um at tú gert okkurt, sum krevur at tú hugsavnar teg.
- Tú kanst vera andaliga virkin tá tú fert til gudstænastu ella á møti, venur joga, fert ein friðarligan túr í náttúruni - eini viðarlund, við havið ella í hagan. Tú kanst eisini vera andaliga virkin tá tú tosar við ein vin um lívsins stóru spurningar. Yvirskipað snýr tað seg um at finna frið og hugdýping.

---

Ad. 6

Skúlastjórin kunnar um at skúlin hevur fingið játtað enn eina verkætlan frá Nordplus
Hendan verkætlan snýr seg um at skúlar í Grønlandi, Estlandi og Føroyum deilar lærarar í einum tíðarskeiði fyri at menna undirvísingartilgongdir _

**Lýsing av verkætlanini á enskum:**

The project involves educational institutions located in the coastal communities: Haabersti Vene Gumnaasium in Tallinn, Estonia, Vags skuli in Vagur, Faroe islands, Kangillinnguit

School in Nuuk, Greenland. This location highlights the necessity of a new educational approach to understand the interdependence that is created when we live close to the sea. That's why our schools started cooperation to improve ecological awareness among schoolchildren as well as appraisal of cultural diversity, respect for nature and tolerance for different cultural manifestations.

Our project goals to share good practice and develop educational methods, pedagogical tools in the area of ecological education, green growth, climate change and sustainable development. The idea of the project is understanding the extent to which direct contact with the sea enriches and transforms life in coastal hometowns: music, literature, painting, gastronomy, jobs, industry, clothing, traditions, myths, personality, religion and death, etc. We provide educational activities, due to which schoolchildren will extend their understanding and valuing their relationship with the sea from different points of view: historical, archaeological, anthropological, geographic and artistic; they enhance respect for nature, value the role of women as regards everything that concerns the sea. Our schools work together for an academic year, creating drama, video, posters, quizzes and other products as part of awareness-raising activities that enhance the protection of our seas. Tallinn school initiated this project idea as the European Commission has chosen the Estonian capital Tallinn as the European Green Capital for 2023.  And we do our best to share experience about teaching schoolchildren to follow the right green life standard.

| | |
|---|---|
| ___________________________ | ___________________________ |
| Durita Poulsen | Rakul Borg Brattaberg |
| ___________________________ | ___________________________ |
| Birgir Jørgensen | |
| ___________________________ | ___________________________ |
| Jónleyg Eyðunsson | Hjørdis Ryggshamar |